MENTAMÁLARÁÐIÐ

FÓLKASKÚLIN

FØROYSKT

Framseting

9. flokkur

16. mai 2017

kl. 10.15-13.45

1. Gráhærdi maðurin

Uppgávuorðing

Greina og tulka stuttsøguna
- legg dent á persónslýsingar

Hvussu er sambandið millum høvuðspersónin og hjúnafelagan?
Hvør er boðskapurin í søguni?

Yvirskrift: Gráhærdi maðurin

Gráhærdi maðurin

Snýsið frá frøkun Sørensen fekk hann at hvøkka við. Hann smíltist ótilvitað og mintist orðini hjá konuni. Hon plagdi at kalla nøsina hjá frøkun Sørensen fyri blástrið. Tað var ágangandi og larmandi í sínari meiningsgeving. Sum eitt barometur á tí illfýsna stignum. Tað var ikki nógv í hesi verð, sum hugaði frøkun Sørensen. Heldur ikki blómutyssið, hann hevði í hondini.
Kvinnan í blómuhandlinum hevði sæð eitt sindur undrandi út, tá ið hann bað um fimm hvítar rósur. Helt ivaleyst, at tað ikki hóskaði saman við teimum gulu tulipanunum. Men hann legði ikki í, hvat hon, frøkun Sørensen, ella nakar annar helt um blómutyssið. Kona hansara hevði altíð elskað gular tulipanir og hvítar rósur. Hon hevði fingið eitt tyssi hvønn brúdleypsdag, tey høvdu verið gift. Í dag var tað tað 55. blómutyssið, hann hevði keypt henni.
Hann hevði eina stokkuta vón um at síggja hatta eygnabráið, tá ið hann rætti henni blómutyssið. Soleiðis sum tað plagdi at síggja út. Bara ein minutt. Hann suffaði ljóðleyst og tók fastari um teir innpakkaðu blómuleggirnar. Tað stakk aftur eitt sindur í bringuni. Eins og fyrr um morgunin. Hann visti væl, at hann skuldi havt ringt til læknan. Men fyrst mátti hann síggja hana. Geva henni blómutyssið. Drekka morgunkaffi saman við henni. Og práta eitt sindur, um lagið á henni var til tað.
Saman við henni var hann á lívi. Hóast sinn hennara meir og meir sveimaði í ókendari verð. Bara at vera henni nær. Kenna angan av henni. Síggja hana. Tað fekk hann at kenna seg betur. Minni einsamallan. Eisini húsini kendust tóm uttan hana. Tað var, sum róptu tey eftir henni. Bóðu hana koma aftur. Taka sær av teimum følnaðu plantunum. Turka dustið burtur. Spreiða sín hugna og sína nærveru, sum áður. Sjálvandi hjálpti tað, at børn og barnabørn komu at vitja. Men tað var annarleiðis, tá ið hon ikki var har. Hann kendi tað á teimum. Eisini tey saknaðu hana. Serliga børnini. Dóttirin og nakrar av ab-

badøtrunum høvdu verið óførar at hjálpa honum. Høvdu vaskað klæðir, ruddað og ymiskt. Men tað var ikki heilt tað sama. Tað strammaði eitt sindur um bringuna. Skuldi hann havt ringt til læknan? Sama ger, hann kundi gera tað seinni. Hevði ivaleyst einki upp á seg. Hann gekk framvegis langar túrar hvønn dag. Kendi seg sum heild væl. Skuldi annar teirra fara, vónaði hann, at hann fór fyrst. Hon fór ikki at sakna hann á sama hátt, sum hann fór at sakna hana. Fór neyvan at varnast tað. Hjá honum var tað øðrvísi. Hon var hansara lívlinja. Hevði altíð verið tað.
„Hvussu gongur við konuni?" Ein hvassur undirtóni lá í røddini, hóast frøkun Sørensen royndi at vera vinarlig. Eyguni hugdu hvøss og grunandi at honum upp um tær stálgráu brillurnar, sum vóru glidnar niður á hálva nøsina.
„Hvassleikin hevur sett seg sum rust á lyndi hennara," plagdi konan at siga. „Hann er blivin ein partur av henni."
„Hon hevur tað gott," svaraði hann.
Frøkun Sørensen sá ivandi út. Men hann hvørki orkaði ella tímdi at tosa um, hvussu konan so líðandi fór frá honum. Longri og longri burtur. Sum ein vilstur fuglur. Frøkun Sørensen rendi nøsina beint frameftir, sum royndi hon at tevja okkurt. Hon nikkaði ímóti kvinnuni við barnavognin og hálvgum teskaði: „So dugnalig í skúlanum, og har stendur hon nú." Nøsin fór beint upp í loft og snýsti forhánisliga. Hann svaraði ikki. Hugsaði, hvussu fitt og vinalig handa unga kvinnan altíð var. Hon arbeiddi sum hjálpari á stovninum. Hevði sera gott tak á búfólkunum. Tolin og dugdi so væl at sissa tey, tá ið sinn teirra gjørdist ørkymlað og øst. Honum dámdi væl at práta við hana. Var so gløgg og vælviljandi. Sýntist nógv eldri, enn hon var. Ein gomul sál, hevði konan óivað sagt. Men hann hevði kenslu av, at tað var lívið, sum hevði gjørt hana eldri. Andlit hennara segði honum tað.
Bussurin steðgaði, og hann kveitti at manninum við yvirskegginum, sum fór úr. Hann var farin at taka bussin í seinastuni. Mundi bilurin vera í ólagi? Teir búðu í sama grannalagi. Hevði mist konuna fyri nøkrum árum síðan. Hann mundi heldur ikki hava tað so lætt. Ikki tí, konan hevði altíð havt á munni, at tað mundi vera tann manglandi kærleikin millum hjúnini, sum var orsøkin til tey manglandi børnini. Men hvat vistu tey í roynd og veru um tað? Vóru tað ikki oftani gitingar, fólk gjørdu sær um onnur? Hildu seg vita. Tað var soleiðis, leysasøgur fingu sín uppruna. Konan hevði tó ongantíð gingið við leysasøgum. Tað skuldi hon eiga. Men tosa, tað hevði altíð dámað henni. Og mangan hevði grein verið í tí, hon tosaði um.
„Hvussu gongur við børnunum?" spurdi frøkun Sørensen, tá ið bussurin koyrdi av stað aftur.
„Jú, tað gongur væl," svaraði hann. Altíð fegin at tosa um børnini. Hansara stoltleiki. Og uggi.
„Sonurin arbeiðir framvegis í einum norskum oljufelag. Fýra vikur úti og fýra vikur heima."
„Og dóttirin?" Nasagluggarnir á frøkun Sørensen darraðu, sum tevjaði hon okkurt.
Hann raknaði við. Hann kendi, hvussu nevarnir knýttu seg. Blóðið streymaði skjótari, og tað stakk aftur í bringuni.
So hon royndi at fregnast, handan heksin. Men hann skuldi so ongantíð geva henni tað, so hon kundi snýsa við hasum forbannaða blástrinum. Ja, søgurnar áttu at ganga, tí ivaðist hann ikki í. Rýmd frá manninum saman við einum dana. Búði nú í Danmark við børnunum.
Ja, hvat skuldi hann siga? Kærleikin fekk fólk at gera ymiskt yvir háls og herðar. Men hon sýntist glað og nøgd. Lukkuligari, enn hon nakrantíð hevði verið við fyrrverandi manninum. Skuldi eisini eiga barn um einar tríggjar mánaðir. Teirra sjeynda barnabarn.
„Og dóttirin?" endurtók hvassa røddin á frøkun Sørensen og klistraði seg sum eitt óviðkomandi pappírspetti inn at honum.
Bussurin steðgaði, og aftaru dyrnar fóru upp. Hann sá unga mannin við keppinum hjálpa við at fáa barnavognin út. Frøkun Sørensen mátti reisa seg, so hann slapp útum. „Dóttir mín er

lukkulig, frøkun Sørensen. Hava tygum nakað ímóti tí?“ Hann fór út úr bussinum uttan at bíða eftir svari. Hoyrdi ikki so mikið sum eitt snýs frá henni. Hann smíltist til kvinnuna við barnavogninum og helt leiðina fram ímóti einum stórum, ljósum bygningi.
Spenningurin vaks í honum, sum hann nærkaðist. Kendi seg aftur sum ein ungling, sum skal hitta unnustu sína. Mintist enn, hvussu hon plagdi at standa og bíða eftir honum við húsarhornið hjá foreldrunum. Tað ljósa hárið skein sum gull í sólini. Eyguni glitraðu sum gimsteinar. Hjarta hansara bóltaði rút hvørja ferð. Knøini gjørdust lin, og hann helt, at beinini fóru at detta undan honum. Tá ið hon so legði armarnar um háls hansara, kendi hann, at hann kundi borið alla verðina í lógvunum.
Hann steðgaði. Andaði djúpt inn og læt hurðina upp. Hon sat longu við tveymansborðið. Tað var borðrreitt til teirra. Til tvey. Ein tómur vasi stóð á borðinum. Hon var í tí vakra, grøna kjólanum. Ein hvít rósa var í hárinum beint yvir høgra oyra. Hjarta hansara dukaði. Hann gekk varliga yvir til borðið við blómutyssinum í hondini.
Hon hugdi upp. Tey vøkru, grønbláu eyguni høvdu eitt kámt brá. Hann læt armarnar falla og stóð eina løtu og hugdi at henni. Kendi, hvussu tað tyngdi um bringuna. Tað gjørdist trupult at anda, og hann mátti styðja seg til borðið. Tað brúsaði í høvdinum. Sum var hann um at skolast burtur. Ein løtt hond legði seg á arm hansara. Hann vendi sær ímóti henni, og takið um bringuna losnaði. Brúsið hvarv, og høvdið klárnaði. „Til lukku, góða.“ Hann rætti henni blómutyssið.
Hon hugdi at honum við tí væl kenda eygnabránum og smíltist. Stillaði seg á tá og kysti hann á kjálkan.

Ingun Christiansen, Skuggamyndir 2015.

2. The Last Ingredient

Uppgávuorðing

Greina og tulka myndina
Sig søguna um gentuna á myndini

Yvirskrift: The Last Ingredient

Bjørk Jónheðinsdóttir Tróndheim, 2016

The Last Ingredient

Í viðgerðini skalt tú m.a. greiða frá
- tí, sum tú veitst um myndina
- myndaslagi (málningur, foto-mynd,
viðgjørd mynd, lýsing e.a.)
- innihaldi
- hvussu myndin er skipað
(t.d. forsýni, miðsýni og baksýni)
- sjónarhorni
- litum og ljósi

3. Ronaldo

Uppgávuorðing

Greið í stuttum frá, hvat greinin er um
Greina blaðgreinina
Hvørjar fylgjur kann tað hava at gera sum Ernesto?
Hevði tú gjørt tað sama sum Ernesto? Grundgev fyri tínum sjónarmiðum.

Yvirskrift: Ronaldo

Ronaldo

2016-3-foroyskt-9-framseting-3.pdf

18 | Sosialurin — Mánadagur 12. oktober 2016 - Nr. 117

Ítróttur — FÓTBÓLTUR

ERNESTO AN

– Vaktirnir høvdu eyguni onkra aðrastaðni, so eg leyp avstað, sigur 17 ára gamli Ernesto, sum gjørdist ein av høvuðssøgunum á Tórsvøllí, har hann rann inn á vøllin og fekk eina selfie saman við Cristiano Ronaldo. Hann kann vænta sær bót ella bann, men hann angrar einki. – Hetta er eitt minni fyri lívið, sigur hann

Petur Albinus

Cristiano Ronaldo fór [illegible] á [illegible] á [illegible], [illegible] Portugal kava verið í Føroyum seinastu dagarnar í sambandi við HM-undankappingarnar. Ikki Madrid-ríddarin gjørdi tað tær nógva sjónvarpsmyndir á vøllinum - hann skrytir eitt [illegible] - men bólkur var tó ein [illegible] á fótbóltsspelara. Cristiano Ronaldo.

Eitt lyfti

Tað var beint. Alfreva seinni hálvleikur [illegible] bríkuleikur í gongd, er fólk varnaðust, at ein [illegible] [illegible] á vøllin og stóra beint til Cristiano Ronaldo. Hann vildi hanvan [illegible] - hann vildi bara hava eina selfie saman við hanvan.

- Eg hevði hesuf vissumarkunum, at eg fór at gera tað, men tær tráðu mær ikki, sigur 17 ára gamli Ernesto Fernari Henríksen, sum fólk meynduna, tí hann [illegible].

Ernesto er uppvaxin [illegible] í Peru, [illegible] hann hevur búði Runavík seinastu fimm árini. Hann [illegible] [illegible] [illegible]

FÓTBÓLTUR

Ítróttur

GRAR EINKI

Einki politimál spyrst burturúr

Innsatsleiðarin hjá lagregluni sigur, at tað er vaktarhaldið hjá Tórsvelli og FSF, sum hevur ábyrgd av at eingin rennur inn á vøllin, og at lagreglan bara er teimum til hjálpar

Petur Altnes

Sum vit eigaranum hjá lagreglunni, so er tað eina, ein ikki dugiligt í at renna inn á vøllin, so tað verður ikki til nakrar politiskar, at leikarin rennur inn á Tórsvøll at Tórsvøll at Tórsvøll at

4. Ung og rúsdrekka

Uppgávuorðing

Greið í stuttum frá innihaldinum í greinunum
Sig tína hugsan um innihaldið í greinunum. Grundgev fyri tínum sjónarmiðum.

Yvirskrift: Ung og rúsdrekka

Ung og rúsdrekka

Onki skal vera tabu heima hjá okkum

- Stóð tað til min, drukku tær ikki, fyrr enn tær vóru 18 ár. Men vit foreldur mugu eisini vera realistisk, sigur Anna Dalsgaard, sum hevur givið sínum tannáringum rúsdrekka. Tað snýr seg um álit og gott samskifti.

Danska heilsustýrið mælir frá, at børn og ung undir 16 ár drekka alkohol. Og ung millum 16 og 18 ár eiga at drekka minst møguligt og ikki meira enn 5 alkoeindir í sonn. Ein alkoeind er ein vanlig øl ella ein snapsur.

Kelda: www.sundhedsstyrelsen.dk

51 ára gamla Anna Dalsgaard hevur saman við mannínum, Jan, valt ta mera liberala loyninna, tá tað kemur til ung og rúsdrekka. Døturnar, Ítakul 26 ár, Katharina 19 ár og Hjørdís 15 ár, hava nevnilliga fingið rúsdrekka, áðrenn tær hava havt aldur at kaypa sjálvar.

Stór tvistøða

Anna Dalsgaard viðgongur, at hetta er ein sera stór tvistøða. Hon er lærari og eisini SSP-lærari, og hon vita tey alt um, at alkohol kann hava skaðilíga ávirkan á ungfólk.

Stóð tað til min, drukku tær ikki, fyrr enn tær vóru 18 ár. Men vit mugu eisini vera realistisk. Tær eru ungar, liva í einum sosialum samanhangi, og tað mugu vit fyrthalda okkum til.

Sera grundleggjandi í heiminum hjá Anna og Jan er dialogurin – at kunna tosa saman.

Vit vilja ikki hava nokur tabu her í húsinum. Tað er týdningarmikið, at vit kunnu tosa um alt. Eisini tey heilliga tingini. Og rúsdrekka.

Bara øl-styrki

Tá døturnar vanliga í sambandi við veitslur í seinnu helvt av 9. flokki – fyrstu ferð hava spurt um at fáa øl við á veitslu, hava foreldrini tosað við tær um vandamar av rúsdrekka, og so hava tær fingið eitt sindur við. Fyrsta ferð tvelv ára, og so er talið kanska komið upp á 4-6 t.d. á ólavsoku. Rúsdrekkað skal í styrki halda seg til veika øllið, tað merkir veðr ella classic. Einki vín, tí tað er ov sterki.

Sjálvandi vilja tey helst hava gentunar bara at drekka tað, tær hava við heimanfra. Men tað eydnast ikki altíð. Onkuntíð hava eldru gentúmar havt meira promillu í sær enn tað, sum var í døturnar, tær fingu við.

- Vit eru ikki so blásygd at halda, at tær ikki kundu funnið upp á at smakkað á okkum frá øðrum. Men vit hava víst teimum siðir álit og virða og vónu, at tær hava virðing fyri tí.

Álit og tætt samband

- Við at vita teimum álit og møta teimum á leiðini í teirra yndki, er stórri møguleiki at varðveita góða dialogin og álitið til okkara børn. Tað hevur altíð havt ómetaliga stóran týdning fyri okkum sum foreldur. Tær skulu kunna sigva við okkum, tá tað var stuttligt í býnum, og tá tað var minni stuttligt, sigur Anna Dalsgaard.

- At skeppa undan, at ung undir 18 ár fara at drekka, er helst at seta málið ov hátt, heldur Anna. Men átaksini, sum SSP hevur havt fyri 7. flokkarnum seinastu árini, og sum enda við rúsdrekka- og rykfríum dansi, kundu kanska verið góð fyri 8. og 9. flokkar eisini. Tí nærmingarnir hava jákað um at fáa eitt sláat tiltak afturi.

34 KVINNA NR. 07/2016

Foreldur skulu tora at siga kortanei

Tað er blákoygt at halda, at børnini bara drekka tað, tú gevur teimum við í ball, sigur Petur Reinert. Hann noktar at keypa børnum sínum rúsdrekka, fyrr enn tey eru 18 ár.







Tá børnini hjá Peturi Reinert í Leirvík fara í ball, kunnu tey akkurát tað sama spara sær at spyrja um eina øl ella tvær cider. Svarið er kortanei.

38 ára gamli Petur og kona hansara, Noomi, hava tað prinsipp, at tey keypa ikki rúsdrekka til børnini.

- Tú ert myndug, tá tú fyllir 18 ár, og áðrenn tað er tikki loyvt at keypa rúsdrekka. Tað er sera einfalt, heldur Petur Reinert, sum er kennari og fótboltsdómari. Hann er pápi at trimum børnum í aldrinum 19, 13 og 0 ár.

Pedagogiskt fjas

Bersøgni lærarin úr Leirvík dyltur ikki fyri, at hann heldur tað vera pedagogiskt fjas, at foreldur skulu lova børnum sínum alt. Foreldur skulu traðka í karakter og tora at siga nei uttan nakra sum helst grundgeving.

Foreldur mýna í alt ov stóran mun at vera vinir við børnini heldur enn at vera foreldur.

Hann er fullgreiður um, at børnini – eisini hansara – snúkja seg at drekka. Men heldur ikki tað fer hann at brøyta meining og keypa teimum rúsdrekka.

Sjálvur snúkti hann seg at drekka, áðrenn hann var 18 ár. Mamman vísti tað, men sagði ongantið nakað.

Vil ikki vita tað

Dóttirin, Teresa, er nú 19 ár. Petur veit, at hon smakkaði sær á, áðrenn hon var 18. Eina ferð hann avheintaði hana í bíli í einari veitslu, sá hann, at hon hevði kenning. Hann lót sum einki. Men við mongunmatarburðið hevði unga dama so ringa samvitska, at hon fortaldi, at hon hevði drukkið lyvkliði fyri.

- Eg vildi als ikki hava hetta at vita. Tí við hesum tvingaði hon mig at taka stóðu til tað.

Dóttirin fekk onga revsing, men fekk at vita, at ælit tekur langa tíð at byggja upp, men er skjótt at brota niður.

Í hansara eygum er einki nýtt undir sólini, tá tað snýr seg um hugin hjá ungfólki at smakka sær á. Tað hava tey gjørt tey seinastu 100 árini, og vit fáa neyvan gjørt nakað við tað. Og so er Leirvík eftir hansara tykki eitt rartiliga lítið og trygt stað, um tey ungu skulu eksperimentera við rúsdrekka.

Sjálvur heldur Petur, at tey hava eitt avslappað forhold til rúsdrekka heima. Tey hava jatnan vín á borðinum friggjakvøld. Konjakk og whisky stendur í skápinum, og øl er í garasjuni. Einki verður fjalt burtur.

Skulu hava sínar loynidómar

Liberalu foreldrini geva børnunum rúsdrekka, fyri at tey ikki skulu drekka alt møguligt – kanska sterkari – frá øðrum. Men hesa grundgevingina keypir Petur Reinert ikki.

- Fyri ti um eg keypi dóttrini seks øl, tryggi eg einki uppá, at hon heldur seg til tað. At halda at børnini bara drekka tað, sum tey fáa við sær frá foreldrunum, er fortankað blákoygt.

Tá ungfólk nøyðast at krógva seg at drekka, so ræmarkar hetta drekkarið eitt sindur. Hvar tey ungu fáa rúsdrekka frá, veit hann ikki, men tað er helst frá umkrum, sum er eldri enn tey. Petur spyr ikki. Tey ungu skulu hava sínar loynidómar í frið.

78% av næmingum í 9.flokki í Evropa halda tað vera lætt at fáa fatur á rúsdrekka. Og 76% av føroysku næmingunum halda tað vera lætt at fáa hendur á rúsdrekka.

Kelda: ESPAD-kanningin 2015

Talgilt tilfar

2016-3-foroyskt-9-framseting-4.pdf

Okkurt løgið hendir eftir jól í 9. flokki

Nógv foreldur eru ov liberal viðvíkjandi rúsdrekka, sigur SSP-ráðgevin, sum biður foreldrini vera meira strong.

- Eg veit ikki, hvat hendir, men kann bara staðfesta, at okkurt broytist miðskeiðis í 9. flokki. Tá kemur rúsdrekka uppí, og tey gerast upptikin av endavitslum, gallavitslum og tilikum, sigur Óli Rubeksen, SSP-ráðgevi.

Í sínum starvi ráðgevur hann nærmingum og foreldrum um m.a. rúsdrekka. Miðkósin er at fáa tey ungu at bíða sum lengst at taka fyrsta smakkin – og annars at drekka sum minst. Hetta eydnast partvís, tí ábendingar eru um, at byrjanaraldurin hækkar eitt vet, sigur Óli Rubeksen og sigur samstundis, at fraávegis eru nógv sum smakka sær á, áðrenn tey eru 18 ár.

Opin og ov liberal

Hann heldur, at tey ungu drekka meira ódult í dag.

Fyri gjørdi tú tær ómak at royna at vera edni, tá tú komst heim aftaná veitsluna. Men tann virðingin ella óttin er ikki so nógv longur. Nógv foreldur eru rætttiliga liberal viðvíkjandi rúsdrekka til tannáringar. Ov liberal, spyrt tú Óla.

Summi keypa hørnunum rúsdrekka í 9. flokki ella góðtaka, at systkini keypa fyri tey. Kanska við eini mískiltari fatan, at um tey sjálvi geva børnunum rúsdrekka, so halda tey seg til tað. Men myndirnar sum SSP-ráðgevi sigur honum, at tað koystir seg best at sigva nei.

- Onki er svart-hvítt, men nógv bendir á, at har foreldur fylgja við og eru afturhaldin við rúsdrekka, er betri javnvág hjá teimum ungu, og tey drekka minni. Eisini sinni í livinum, staðfestir Óli Rubeksen.

Bólkatrýst

Ofta er tað bólkatrýst, sum fær tey ungu at smakka sær á. Tey gera tað, tí tey kuba í flokkinum gera tað, og tey vilja ikki vera uttanfyri. Ella fatan er, at tá eigur at drekka, tí øll hini gera tað. Hetta er fleirtalsmisskiljing, tí tað eru eisini nógv ung, sum ikki drekka, sigur Óli Rubeksen.

Nokur hetir tá hvda so mikið vel í sær sjálvum, at tey tora vel at sigva nei. Men tey flestu tvála eftir felagskapinum og at hoyra til.

Fyri at linka bólkatrýstið noynir SSP at vísað øll tey, sum IKKI drekka. Tá hagtal vísa, at 40 prosent í einum árgangi smakka sær á, er tað týdningarmikið at fortelja um tey 60 prosentini, sum ikki drekka. At venda argumentatiónini hevur ávirkan á tey ungu, sigur Óli Rubeksen.

17 er meira enn 15

Hóast hann mælir føroyskum foreldrum til at vera meira strong við rúsdrekka, eru undantøk. Tað er hóast øll mannur á at vera 15 ár og 17 ár.

Hava tey verið á fjalli, og snapsarin gongur runt, tá seyðurin er komin til hakdar, er onki forgjørt í, at 17 ára gamli fjallmaðurin fær sær upp í munnin, tá hini fáa sær. Vit skulu heldur ikki vera so fyrkantað, sigur Óli Rubeksen.

Hansara besta ráð eru, at foreldrini tosa við tannáringarnar um rúsdrekka – og onnur viðurskifti, sum hava týdning fyri tey. Hetta prátið skal takast "í friðartíð", altso áðrenn sonurin ella dóttirin biðja um sína fyrstu øl. Og tí er 13–14 ár ein hóskandi aldur.

Í Danmark er byrjanaraldurin til rúsdrekka hækkaður seinastu árini, og tey ungu drekka heldur minni. Í 2014 byrjaðu 48% av teimum ungu at drekka, tá tey vóru 15-16 ára gomul, meðan 41% byrjaðu sum 13-14 ára gomul. Fimm ár frammanundan var talið umvent. Hagtølini vísa eisini, at færri drekka regluliga. Talið á 15 ára gomlum, sum drekka hvørja viku, er minkað niður í ein triðing síðan 2002.

Kelda: www.alkoholdialog.dk

5. Nú fara vit at ferðast

Uppgávuorðing

Greina og tulka lýsingina
Sig tína hugsan um lýsingina
Ávirka slíkar lýsingar okkum? Grundgev.

Yvirskrift: Nú fara vit at ferðast

Nú fara vit at ferðast

Smyril Line, 2016

2016-3-foroyskt-9-framseting-5.mp4.

Í viðgerðini skalt tú m.a. greiða frá:
- hvat lýsingin snýr seg um
- hvat endamálið við lýsingini er?
- hvør sendari og móttakari er?
- hvussu huglagið er
- hvørjar málsligar snildir eru nýttar í lýsingini?
- hvussu ljóð og tónleikur verða nýtt í lýsingini?
- heitið á lýsingini